umhvørvisstovan

Vegleiðing 17/2016

Vegleiðing um krøv til rottangar

Henda vegleiðing er ætlað kommunum fyri at gera tað greiðari at seta neyðug krøv til rottangar, soleiðis, at hesir virka eftir ætlan, og eru lættir at tøma og røkja. Vegleiðingin er galdandi fyri allar støddir av rottangum, bæði til sethús, størri bygningar, útstykkingar o.a.

1. Hvussu virkar ein rottangi?

Ein rottangi reinsar spillivatn mekaniskt. Tað vil siga, at tilfar verður hildið aftur, annaðhvørt sum tilfar, ið søkkur til botns (botnevja) ella tilfar, sum flýtur (skorpa). Reinsingin gerst betri, tá tangin er lutfalsliga stórur í mun til ta nøgd av spillivatni, sum rennur gjøgnum hann. Ov smáir og ov fyltir tangar reinsa illa.

Ikki allir rottangar á marknaðinum reinsa nóg væl, og summir kunnu vera torførir at tøma. Tað hevur tí týdning, at kommunur ansa eftir, at einans tangar, sum lúka treytirnar í hesi vegleiðing, vera brúktir, og at hesir hava eina stødd, sum hóskar til nøgdina av spillivatni, t.e. hvussu nógv fólk eru í húsinum ella tal av húskjum, sum eru knýtt í tangan (sí pkt. 5), og at vegleiðingin annars verður fylgd viðvíkjandi uppseting o.ø. (sí pkt. 2 og 3)).

2. Generell krøv til allar rottangar

Kommunur eiga einans at loyva nýtslu av rottangum, sum lúka hesi krøv:

1. Tangin skal bæði halda aftur tilfari, sum søkkur og tilfari, sum flýtur,
2. Rottangin skal vera soleiðis gjørdur, at øll rúm lættliga kunnu tømast,
3. Mát á rørum, sum ganga til og frá tanganum:
    a. ø110 mm fyri tangar upp til 6 m^3,
    b. ø160 mm fyri tangar størri enn 6 m^3,
4. Rottangin skal vera CE-merktur,
5. Rottangin skal vera framleiddur sambært DS/EN 12566-1[1], við hesum ískoytum:
    a. Úrslitið av "Hydraulic efficiency test", smb. DS/EN 12566-1, Annex B, skal ikki vera hægri enn 5 g,

[1] "Små spildevandsanlæg op til 50 PE – Del 1: Præfabrikerede septiktanke".

b. Innara tvørmátið á møguligum atkomurøri skal í minsta lagi vera 500 mm fyri tangar upp til 6 m^3 og 780 mm fyri tangar størri enn 6 m^3, ella skal tangin, uttan mun til stødd, hava tvey atkomurør, har innara tvørmátið í minsta lagi er 500 mm (sí mynd 1),
c. T-rør/Y-rør ella "dykkpláta skal vera á frárenningini (ovari kantur av T-røri/Y-røri skal í minsta lagi vera 200 mm yvir vatnskorpuni),
d. Frárenningin skal vera 50-100 mm lægri enn tilrenningin,
e. Skott í tanganum skulu stinga í minsta lagi 200 mm upp um vatnskorpuna,
f. Tangin skal vera býttur í tvey ella fleiri rúm,
g. Tangin skal vera tættur og úr haldgóðum tilfari.



Mynd 1 Rottangi við tveimum rúmum. Spillivatn rennur inn í tangan gjøgnum tilrenningarrør og reinsað spillivatn rennur frá tanganum gjøgnum frárenningarrør (við T-røri).

Áðrenn loyvi verður givið til at seta tangan niður, skal kommunan eisini meta um, hvørt tangin kann tømast á fullgóðan hátt. Tangin skal vera góður at tøma, eisini um hann hevur atkomurør. Verður mett, at tangin ikki er lættur at tøma, tá hann er settur upp, eigur loyvi ikki at vera givið.
Gev gætur, at tangar, sum hava ov smá lok, eru torførir at tøma. Tangar við fleiri lokum eru ofta lættari at tøma.

3. Krøv til at seta rottanga niður

Tað er týdningarmikið, at kommunur hava eftirlit við, at rottangar og rør eru rætt løgd. Hetta fyri at tryggja, at rottangar kunnu tømast og røkjast sum teir eiga. T.d. er tað av týdningi at kunna sleppa framat at spula gjøgnum til- og frárenningarrørini, um tey eru tipt.

Krøvini til borgara/virki eiga í minsta lagið at vera hesi:

1. Tangin skal setast niður sambært vegleiðing frá framleiðaranum.
2. Tangin skal vera lættur at koma til at tøma og røkja.
3. Tað skal vera gjørligt at fáa atgongd til til- og frárenningarrørini, t.d. við at reinsirør verða sett á rørini báðu megin tangan.
4. Tangin skal í størst møguligan mun gravast soleiðis niður, at lokið er ájavnt lendið. Djúpari tangin stendur, tess torførari er hann at tøma.
5. Atkomurør skulu bert brúkast, har tað ikki ber til at hava lok/lokini ájavnt við lendið.

Harafturat eigur kommunan at meta, hvørt tað er neyðugt, at rottangi skal útluftast[2].
Tangin skal ikki tyrvast fyrr enn kommunan hevur staðfest, at alt er sambært krøvunum í byggiloyvi, hesi vegleiðing og vegleiðingini frá framleiðaranum.

4. Hvørjir rottangar kunnu brúkast?

Kommunur skulu altíð tryggja sær, at rottangar, sum verða tiknir í nýtslu, lúka krøvini í hesi vegleiðing. Munur er tó á, um talan er um um húsarhaldsrottangar (2 m^3) ella um rottangar, sum eru størri enn 2 m^3:

- Einans húsarhaldsrottangar, ið eru góðkendir av Umhvørvisstovuni kunnu brúkast. Her er listi yvir góðkendar rottangar: www.us.fo/rottangar.
- Tangar, størri enn 2 m^3, kunnu ikki takast í nýtslu, uttan at kommunan hevur tryggjað sær, at tangin lýkur krøvini í hesi vegleiðing. Fyri at meta um hetta, má kommunan biðja framleiðara/seljara/innflytara um at útvega skjalprógv, eitt nú góðkenningar.

5. Stødd á rottanga

Støddin á rottanganum skal lagast eftir støddini á húsarhaldinum. Minst loyvda støddin er 2 m^3.[3] Henda stødd kann brúkast til hús/íbúðir við upp til 5 íbúgvum. Her verður roknað við, at tangin verður tømdur á hvørjum ári. Ganga hús/íbúðir saman um ein rottanga, skal tanga-støddin ásetast sambært talvu 1.

[2] Í Danmark er ymiskt frá kommunu til kommunu, hvussu hetta verður gjørt. Summar krevja, at útluftast skal við 5. hvønn rottanga og aðrar við hvønn rottanga.
[3] Smb. Dansk Standard DS 440 "Dansk Ingeniørsforenings norm for mindre afløbsanlæg med nedsivning"

Talva 1 Stødd á rottangum í mun til hvussu nógv hús/íbúðir eru íbundin.[4]

Fólk, tal	Hús/íbúð, tal	Rúmd, m^3
1-5	1	2
6-10	2	4
11-15	3-4	6
16-20	5-6	8
21-25	7-8	10
26-30	9-10	12

Dømi: um fýra hús hava ein rottanga í felag, skal støddin á honum verða minst 6 m^3.

6. Hvat kann fara í tangan?

Umhvørvisstovan mælir til, at bæði svart og grátt spillivatn frá sethúsum verður leitt í rottangan. Vanlig mannagongd hevur í nøkrum førum annars verið at leiða grátt spillivatn uttan um rottangan í kloakkina. Hetta eigur bara at verða gjørt tá spillivatnið verður leitt í annan reinsibrunn, t.d. feittbrunn.

Í mesta lagið 20% av fasta tilfarinum, sum verður leitt í rottangan, verður niðurbrotið, restin verður verandi í tanganum til næstu tøming. Reinsingin í tanganum versnar, jú meira hann verður fyltur. Fyri at rottangin skal virka eftir ætlan, skal hann tømast regluliga.

Kommunur eiga at minna borgarar á, ikki at lata vatn renna óneyðugt. Um ov nógv vatn rennur í tangan, tekur vatnstreymurin fast tilfar úr tanganum og út í kloakkina.

7. Feittbrunnar

Feittbrunnar skulu, eins og rottangar, tømast regluliga. Feittbrunnar mugu ikki setast upp innandura. Tað er týdningarmikið, at staðsetingin uttandura er soleiðis vald, at feittbrunnurin ikki elvir til luktampar. Feittbrunnar eru ikki longur loyvdir til sethús í Danmark.

Spillivatn frá virksemi innan framleiðslu, viðgerð og borðreiðing av mati, skal leiðast í feitt-brunn, áðrenn tað verður leitt víðari í ávikavist rottanga ella spillivatnsskipanina.

[4] Vejledning fra Miljøstyrelsen, Nr. 3, 1999, sí s. 18.

8. Kunning til borgarar

Kommunur eiga at vegleiða borgarar um, hvat skal gerast fyri at tryggja, at rottangin virkar sum hann skal, t.d.:

- Leið ikki sýru, klor ella onnur kemikalii í tangan, hvørki frá vøskum ella skolað niður í WC'num. Slík evni tálma rotingini, umframt at dálka havið.
- Lat ikki vatn frá vøskum o.ø. renna óneyðugt (í tangan). Jú meira vatn rennur í tangan, verri reinsar hann.
- Ikki skola t.d. blæur, eingangslappar, vattpinnar, sigarettstubbar og heilivág niður í WC'ið.

Kommunur eiga á heimasíðu síni ella aðrastaðni at kunna borgarar/virki um, hvørjar reglur galda fyri rottangar, og hvat borgari/virki skal gera, tá rottangi skal útvegast, setast niður, flytast o.a.

9. Kommunan er myndugleiki

Kommunan skal, sum umhvørvismyndugleiki á staðnum, við teimum lógum og reglum, sum eru galdandi (sí pkt. 10) og teimum heimildum hesar reglur geva, tryggja sær, at spillivatns-viðurskifti hjá borgarum, virkjum o.ø. eru í lagi. Kommunan eiga at kunna borgarar um galdandi lóggávu og serliga um, at hvørki borgari ella virki kunnu útvega og enn minni grava niður rottanga, uttan at kommunan hevur givið loyvi. Av tí, at snið og góðska á rottangum er ymisk frá tanga til tanga, hevur tað týdning, at kommunan ansar eftir, einans at loyva nýtslu av húsarhaldsrottangum, sum eru góðkendir og annars tangum, sum lúka viðkomandi krøv (sí pkt. 2) og, at kommunan altíð setur krøv til at seta niður rottangar (sí pkt. 3).

Best er, at kommunan brúkar autoriseraðan kloakkmeistara ella fólk við líknandi førleika til at avgreiða mál um rottangar. Hetta er tó ikki eitt lógarkrav í Føroyum.

10. Viðkomandi lóggáva á økinum

- Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn
- Kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillvatnsevju
- Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur

Kunngerð um spillivatn ásetur, at alt spillivatn skal reinsast mekaniskt áðrenn tað verður leitt á sjógv. Hetta merkir, at spillivatn frá einum húsarhaldi antin skal leiðast í egnan privatan rottanga, ella í ein størri kommunalan rottanga, sum er felags við onnur húsarhald.

Kunngerðin um spillvatnsevju ásetur, at allir rottangar skulu tømast regluliga.

Í kunngerðini um umhvørvisreglur er ásett, at tað "*ikki er loyvt at taka í nýtslu rottangar, sum ikki lúka vanlig standardmál fyri rottangar, jvb. nærri tilvísing frá Umhvørvisstovuni*" og at "*loyvt er ikki at fara undir húsabygging, uttan at kommunustýrið hevur góðkent, hvussu grund- og omanávatnið skal veitast burtur, hvussu vera skal við spillivatni, og húsini mugu ikki takast í nýtslu, fyrr enn kommunustýrið hevur váttað, at alt er sum fyrisett*".

Kommunustýrið skal sostatt tryggja sær, at borgari, sum ætlar undir at byggja hús, ikki fer í gongd, uttan at øll viðurskifti við spillivatni, t.e. rottanga, rørum o.ø., eru í lagi. Kommunalar byggireglugerðir og líknandi, sum hava reglur um spillivatn og rottangar, skulu fylgja hesum ásetingum.

11. Allýsingar

- *Svart spillivatn:* Frárensl frá WC.
- *Grátt spillivatn*: Frárensl frá vøskum, bað og brúsu (ikki WC).
- *Rottangi (septiktangi):* felagsheiti fyri allar støddir av tangum, sum reinsa spillivatn mekaniskt, t.e. við at tilfar fellur niður á botn og at tilfar flotnar. Ein ávís roting fer fram í einum rottanga, men heitið kundi eins væl verið botnfellingartangi.
- *Húsarhaldsrottangi:* Rottangi, har rúmdin er 2 m^3
- *Reinsiverk*: Er tangi ella anlegg, sum umframt mekanisk, eisini reinsar spillivatnið kemiskt og/ella biologiskt. Reinsiverk verður í dagligari talu eisini brúkt um stórar rottangar, t.d. at brúka í útstykkingum.
- *Atkomurør:* rør, sum verður sett omaná opið á tangum, sum ikki liggja ájavnt við lendi. Atkomurøri tryggjar atgongd til tangan, t.d. í samband við tøming. Á donskum: opføringsrør.

Fyrsta útgáva: 21-06-2016